# SkúgvaTvøroyrar Býráð til viks

**Løgmálaráðið hevur sett tríggjar avgerðir hjá Tvøroyrar Býráð úr gildi, men á Tvøroyri gevast tey ikki so**

KOMMUNAL RÆTTINDI
*Áki Bertholdsen*


*Tað er nú endaliga staðfest, at Tvøroyrar Kommuna hevur ikki loyvi til at nokta einum skipi hjá Strandferðsluni atløgupláss*

– Tvøroyrar Býrráð hevur ikki heimild til at nokta einum skipi hjá Strandferðsluni atløgupláss.

Tað hevur løgmálaráðið hjá Landsstýrinum nú endaliga samtykt.

Tískil hevur løgmálaráðið sett avgerðirnar hjá Tvøroyrar Býráð um at nokta Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri úr gildi.

Løgmálaráðið metir ikki, at kommunan hevur grundað sína avgerðir um at nokta Dúgvuni atløgupláss á saklig og lóglig atlit og tí verða avgerðirnar settar úr gildi, sigur Løgmálaráðið við Tvøroyrar Býráð nú um ársskiftið.

Sostatt er staðfest, at hóast kommunan eigur havnalagið, hevur tað ikki rættindi til at gera av, hvørji skip skulu fáa atløgupláss og hvørji skulu ikki og, hvat havnaløgini annars verða brúkt til.

Og tað metir Tvøroyrar Býráð at vera eitt ógvuliga álvarsligt mál, ikki bara fyri Tvøroyrar Kommunu, men fyri allar kommunur í landinum, har kommunalar havnir eru.

Tí vil Býráðið heldur ikki góðtaka avgerðina í fyrstu syftu.

Finnleif Guttesen sigur, at býráðið tískil fer at leggja málið fyri sakførara fyri at vita um grundarlag er at fara víðari við málinum og at royna málið í rættinum fyri at fáa eina endaliga avgerð.

## Mótsigandi

Borgarstjórin á Tvøroyri er eisini av teirri áskoðan, at avgerðin hjá løgmálaráðnum er mótsigandi.

– Strandferðslan hevur skyldu at flyta ferðafólk. Men avleiðingin av tí má so vera, at landið eisini hevur skyldu til at gera ferjuleggurnar, tí tað ber ikki til at áleggja kommunum at geva skipum hjá landinum atløgupláss.

Hann heldur eisini, at kann Tvøroyrar Kommuna ikki nokta Dúgvuni atløgupláss, kann Tórshavnar Kommuna heldur ikki nokta nýggja Suðuroyarskipinum atløgupláss.

Tað, hann sipar til, er, at sum støðan er í løtuni, vil Tórshavnar Kommuna ikki binda seg til at geva nýggju suðuroyarferjuni fast atløgupláss, tí landið vil ikki vera við til at betala ferjuleguna.

Og Finnleif Guttesen ásannar eisini, at at Tórshavnar Kommuna hevur ikki noktað skipinum atløgupláss, so málini kunnu ikki heilt samanberast.

Men Tórshavnar hevur víst á, at nýggja skipið fær ikki fast atløgupláss, men sleppur at liggja, har sum pláss er frá fer til fer.

– Tað sama kann væl eisini koma fyri á Tvøroyri. Er onki pláss fyri einum skipi, so er er onki pláss, heldur ikki á vanligu ferjuleguni um so skuldi verið.

– Men hvørki Landið, Strandferðslan, ella ferðafólk kunnu liva við, at ferðamannaskipini ikki hava fast atløgupláss og tí má tað vera skyldan hjá Landsstýrinum at tryggja skipunum fast atløgupláss, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

Hann vísir m.a. á, at oftani fríggjadagar og viðhvørt eisini hósdag, verður Smyril noyddur at leggja at á gamla havnalagnum, tí Clare liggur á Drelnesi og tekur farm.

– Men tað er ein kommunal avgerð, at Clare og farmaflutningur skal fáa fyrsta rætt til havnina á Drelnesi, tí tey betala nógv meiri havnagjald enn Smyril ger.

# Hevur fyrr noktað Dúgvuni atløgupláss

**Tað er ikki nakað nýtt, at Tvøroyrar Kommuna hevur noktað Dúgvuni atløgupláss, men Landsstýrið hevur tvær ferðir biðið um undantaksloyvi**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Tvøroyrar Kommuna hevur tvær ferðir fyrr noktað Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri. Og tær báðu ferðirnar góðtók landsstýrið eftir øllum at døma avgerðina.

Hettta framgongur av brævi, sum Løgmálaráðið nú um ársskiftið hevur sent Tvøroyrar Býráð og sum vit greiða frá í hinari greinini her á síðuni.

Orsøkin til tvídráttin ímillum Landsstýrið og Tvøroyrar Býráð um Dúgvuna, er, tað nakrar ferðir hevur verið ætlanin at brúka Dúgvuna til avloysaraskip fyri Smyril, tá ið hann hevur verið á beding til eftirlit.

Tað er hent nakrar ferðir og hendi aftur í mai í fjør og eisini ta ferðina var ætlanin at Dúgvan skuldi røkja siglingina.

Men vildi Tvøroyrar Býráð ikki góðtaka og fyri at noyða Styrandferðsluna at finna eina aðra loysn, samtykti Býráðið einmælt at nokta Dúgvuni atløgupláss á Tvøroyri.

Býráðið sigur m.a. at Strandferðslan hevur skyldu til at røkja sambandið á nøktandi hátt og tað heldur býráðið ikki, at kommunan ger við Dúgvuni.

Men hetta vildu Vinnumálastýrið ikki góðtaka og heitti á løgmansskrivstovuna um at seta avgerðina úr gildi og tað varð beinanvegin gjørt við eini fyribilsavgerð.

Tó skuldi ein endalig avgerð takast seinni

Hetta vildi kommunan ikki góðtaka og vísti á, at bæði í 1996 og í 1997 hendi tað sama, at býráðið noktaði Dúgvuni atløgupláss. Tær báðu ferðirnar góðtók landsstýrið avgerðina og bað býráðið um undantaksloyvi, uttan at mótmæla avgerðini annars, sigur Býráðið.

## Klagaðu

Men tað dróg út at taka tað endaligu avgerðina og tá ið seks mánaðir vóru farnir, uttan at ein endalig avgerð varð tikin, klagaði býráðið umsitingina fyri Løgmanni. Um tað var hetta, sum hjálpti, skal vera ósagt, men nú gekk heilt skjótt at taka tað endaligu avgerðina og hon er tann sama sum fyribilsavgerðin.

Løgmálaráðið sigur, at tað er álagt Strandferðsluni at flyta farm og ferðafólk.

– Skal kommuna nokta almennum myndugleika at røkja sínar lógarbundnu uppgávur, má hon hava lógligt og sakligt grundarlag at byggja slíka avgerð á, sigur løgmálaráðið.

Løgmálaráðið sigur, at tað er ikki uppgávan hjká Tvøroyrar Kommunu at meta um, antin Strandferðslan hevur røkt sínar lógarbundnu skyldur.

Og tí heldur ráðið heldur ikki, at avgerðin hjá kommuni byggir á saklig og lóglig atlit og tí verður avgerðin sett úr gildi.

At landsstýrið ikki í nítiárunum mótmælti avgerðunum um at nokta Dúgvuni atløgupláss, ella setti tiltøk í verk ímóti kommununi tá, kann ikki tulkast sum at Landsstýrið metti, at avgerðin løgfrøðiliga var í lagi, sigur løgmálaráðið.



Tórbjørn Jacobsen:

# Løgmaður eigur at fylgja kanningini


*Tá ein kanning av hesum slagi er gjørd, so má handlast, antin tað er positivt ella negativt, og niðurstøðurnar eiga at verða fylgdar, sigur Tórbjørn Jacobsen.*

**Bólturin liggur hjá løgmanni og Jørgin Niclasen, og teir eiga at fylgja niðurstøðunum í kanningini hjá Turið Debes Hentze advokati. Tað sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin, ið reisti fyrispurningin, sum førdi til kanningina av embætisførsluni hjá Jørgini Niclasen**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

– Eg fari ikki at svara uppá, um eg reisi eitt misálit í tinginum, ella um eg atkvøði fyri einum misáliti ímóti landsstýrismanninum, tí hartil er málið als ikki komið enn, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin.

Kendi rokskiparin av Glyvrum noyðist at sigla millum skerini í hesum døgum. Hann vil ikki siga nakað beinleiðis um, hvørt landsstýrismaðurin við fiskimálum eigur at fara frá, eftir at ein kanning hevur staðfest, at feilir eru gjørdir í hansara umsiting, ið hava sett almennan penning í óneyðugan vanda.

Anstøðan í løgtinginum hevur boðað frá, at hon setir fram misálit, um landsstýrismaðurin ikki fer frá við góðum, ella løgmaður setir hann frá. Men Tórbjørn Jacobsen, sum kann gerast avgerandi 17. løgtingsmaðurin í hesum máli, vil altso ikki siga, hvørt hann hevði atkvøtt fyri einum uppskoti um misáliti, sum kann fella landsstýrismannin.

## Tobbi reisti málið

Tað var annars Tórbjørn Jacobsen, sum reisti fyrispurningin í løgtinginum, ið hevur ført til kanningina av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen landsstýrismanni. Fyrispurningur nr. 28 í 1999 hevði við sær, at Landsstýrismálanevndin hjá løgtinginum, ið hevur eftirlit við landsstýrinum, vildi hava málið kannað. Seinni setti Finnbogi Ísakson, táverandi løgtingsformaður, Turið Debes Hentze advokat at standa fyri kanningini.

Hennara niðurstøða er, at umsitingin í Fiskimálaráðnum í tveimum førum hevur verið á samanstoytskós við lógina um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan. Talan er um rækjutrolararnar Arctic Viking og Høgafoss, sum kostaðu landskassanum milliónir, tí mannagongdir ikki vórðu fylgdar í sambandi við umlegging av lánum.

## Røtt niðurstøða

Tórbjørn Jacobsen hevur lisið frágreiðingina hjá Turið Debes Hentze tvær ferðir, og hóast hann ikki sigur tað beinleiðis, so hoyrist á honum, at landsstýrismaðurin onkursvegna átti at tikið avleiðingar av málinum sjálvur.

– Eg eri ikki løgfrøðingur, men soleiðis sum Turið Debes Hentze byggir málið upp, so er niðurstøðan røtt. Tá ein kanning av hesum slagi er gjørd, so má handlast, antin tað er positivt ella negativt, og niðurstøðurnar eiga at verða fylgdar. Men bólturin liggur hjá løgmanni og landsstýrismanninum, og teir eiga næsta leik. Tað skuldi verið óneyðugt at reist misálit í løgtinginum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann vísir í somu vending á, at í Fólkatinginum er tað bara hent einstakar ferðir, at ein ráðharri er farin frá við misáliti. Tað hevur altíð verið nóg mikið, at ivi er sáddur um embætisførsluna, og antin er ráðharrin farin sjálvur, ella hevur forsætismálaráðharrin koyrt hann frá av politiskum ávum. Í hesum føri eru umstøðurnar skerpandi, tí talan er um eina uttanveltaða løgfrøðiliga kanning, heldur Tórbjørn Jacobsen.

# Umsitingin kannar seg sjálva

**Umsitingin í Fiskimálaráðnum er sett at kanna niðurstøðurnar í kanningini hjá Turið Debes Hentze advokati, ið kunnu fella landsstýrismannin við fiskivinnumálum. Umsitingin eigur at halda fingrarnar vekk, tí hon er ógegnig, heldur Tórbjørn Jacobsen**

KANNING
*Ingi Rasmussen*

Kanningin av embætisførsluni hjá Jørgin Niclasen, landsstýrismanni við fiskivinnumálum, fer ikki aftur við borðinum. Tað hevur løgmaður lovað.

Anfinn Kallsberg løgmaður umhugsar framvegis málið og hevur fingið lógarkøn fólk at lesa frágreiðingina frá kanningarstjóranum, nú hann stendur fyri einari torførari avgerð.

Spurningurin er, um Jørgin Niclasen skal missa sessin, nú Turið Debes Hentze advokatur, er komin til ta niðurstøðu, at skeiv málsviðgerð hevur ført til, at landskassin er komin í óneyðugan tapsvanda.

Heldur ikki í Fiskimálaráðnum, sum stendur fyri skotum, fer kanningin aftur við borðinum. Jørgin Niclasen landsstýrismaður hevur sett sína egnu umsiting at kanna eftir, um niðurstøðurnar í kanningini eru rættar, og serliga 3-mannanevndin, sum skal vera við í málsviðgerðini, tá lán til fjarfiskiflotan verða løgd um, er biðin at svara ymiskum spurningum.

Líkt er sostatt til, at umsitingin í Fiskimálaráðnum er farin at gera sína egnu kanning av týðandi táttum í málinum, ið er vorðið ein trupulleiki hjá landsstýrismanninum.

Hetta hóvar ikki Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmanni fyri Tjóðveldisflokkin. Hann reisti upprunaliga málið um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan, sum øll neyðin snýr seg um.

– Hvørki løgmaður ella landsstýrismaðurin eiga at seta síni egnu fólk at kanna niðurstøðurnar hjá kanningarstjóranum, tí umsitingin er inhabil. Umsitingin er inhabil, tí tað er hon, sum er kannað í kanningini hjá Turið Debes Hentze. Tað eigur at vera hendan kanningin og onki annað, sum liggur til grund fyri einari avgerð. Annars kunnu vit tað sama gevast at rinda hálvar milliónir fyri slíkar kanningar, sigur Tórbjørn Jacobsen.